# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 18. mars 2010


## KÍF-Ternan 1-3 (25-23, 23-25, 20-25, 14-25):

# Ternan tók fyrsta stikkið



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Fyrri upp- og niðurflytingardysturin millum Eik-ligukvinnurnar hjá KÍF og 1. deildarkvinnurnar hjá Ternuni var í ítróttarhøllini í Kollafirði í gjárkvøldið. Toftakvinnur vóru drúgvari og vunnu 3-1, eftir at KÍF hevði tikið fyrsta settið.

Dysturin var sera javnur tey bæði fyrstu settini, har tað kundi farið báðar vegir. Tá avtoranaði, vann KÍF fyrsta sett og Ternan annað sett, men bara tveir bóltar vóru á muni í báðum settunum, so her sá alt sera javnt út undan teimum næstu settunum.

Men í triðja setti byrjaði Ternan at vinna sær yvirvág og at leggja trýst á, so kvinnurnar hjá KÍF fóru at gera feilir og høvdu ilt við at halda konsentratiónina. Ternan vann settið og gjørdi síðani bart í triðja setti, har støðan eina løtu var 14-4, til Ternan hevði vunnið tað greitt og tí eisini vann dystin.

Sostatt hava flogbóltskvinnurnar á Toftum vunnið sær ein fyrimun undan seinna dystinum millum liðini, sum verður í høllini í Tofta skúla næsta mikukvøld. Í hesum upp- og niðurflytingardystunum verður spælt best av trimum, har liðini fyrst hava hvør sín heimadyst, men skulu møtast á uttanveltaðum vølli, verður neyðugt við einum avgerandi triðja dysti.



**Hóast KÍF vann fyrsta sett, so tók Ternan trý tey næstu og hevur fyrimun undan seinna upp- og niðurflytingardystinum hjá kvinnum**

Mynd: Rógvi Nybo



Magnus Andreasen stóð seg so mikið væl í innleiðandi skjótingini í gjár, at hann endaði millum 16 teir bestu

# Magnus í EM-finalu

Í gjár vóru innleiðandi umførini í EM-kappingini í innandura bogaskjóting skotin í Kroatia, har tveir føroyskir skjúttar eru við – Jógvan Niclasen í compound hjá vaksnum og Magnus Andreassen í juniorbólkinum í compound.

Magnusi Andreassen, sum skjýtur í juniorbólkinum, ið eru skjúttar upp til 18 ár, megnaði at fáa 570 av 600 møguligum stigum, og hetta var nóg mikið at koma upp á 15. pláss.

Sostatt telist hann millum skjúttarnar, sum í morgun skuldu skjóta finalurnar, og har skuldi hann í fyrsta umfari møta skjúttanum, sum gjørdist nummar 18 innleiðandi.

Jógvan Niclasen, sum fekk 574 av 600 møguligum stigum, gjørdist akkurát ov stuttur til finaluna, tí hann gjørdist nummar 34 – og 32 teir fremstu sluppu í finalurnar.

-eij

# Talvkappingin endar við braki

**Í øllum deildum, uttan 3. deild, er spenningurin stórur undan síðsta umfarinum í liðkappingini í talvi, sum verður í Pálsstovu í Havn leygardagin**



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Møguleiki er fyri, at alt endar í einum trunka í 1. deild, tí har eru trý lið um boðið. Klaksvík 1 er eitt stig framman fyri Vestmanna 1 og Havnina 1, og síðsta kappingardagin telvar Klaksvík 1 ímóti Havnini 1, meðan Vestmanna 1 telvar ímóti Sandavági 1.

Reglurnar siga, at enda tvey lið jøvn, bæði í stigatali og dystarstigum, verður umdystur telvaður, so skjótt sum øll talvini eru liðug, og telvararnir fáa 10 minuttir í part. Stendur framvegis á jøvnum, verður nýggjur umdystur, men hesa ferð í snartalvi, og tá verður telvað, til annað liðið vinnur og sostatt eisini verður meistari.

Enda øll trý liðini jøvn, telva øll liðini ein dyst ímóti hvørjum øðrum, har 10 minuttir eru í part til hvørt talvið. Eru liðini framvegis jøvn, verður eisini her telvað við snartalvi, til eitt lið hevur vunnið.

Í 2. deild er Sandavágur 2 á odda, við tveimum stigum fleiri enn Havnin 3 og Havnin 2. Um fleiri lið enda jøvn her, verða dystarstigini avgerandi. Í 3. deild, sum er einasta deildin uttan spenning, er Vestmanna 3 longu vinnari, og hóast vestmenningar hava fríumfar, so eru teir heili átta stig framman fyri Skopun, sum er á einum somuleiðis tryggum øðrum plássi.

So er tað unglingadeildin, har tað er umleið líka spennandi sum í 1. deild, tí her er Sandavágur hálvt stig framman fyri Havnina A og hálvtannað stig framman fyri Vestmanna. Øll trý hava møguleika at vinna deildina, og her ger seg galdandi, at enda liðini jøvn í stigum og dystarstigum, verður umdystur eftir sama leisti sum í 1. deild.



**Bæði í 1. deild og unglingadeildini kann tað enda við umdysti, um fremstu liðini standa á jøvnum eftir seinasta umfarið, sum byrjar í Pálsstovu leygardagin klokkan 13**

## FAKTA

**Tey fýra sterku liðini, ið telva avgerandi dystirnar leygardagin, kunnu vera mannað soleiðis:**

**Havnin:** Helgi Dam Ziska, Martin Poulsen, Jóan Hendrik Andreasen og Hans Kristian Simonsen

**Klaksvík:** Heini Olsen, Ólavur Simonsen, Eyðun Nolsøe og Finnbjørn Vang

**Vestmanna:** John Rødgaard, Carl Eli Samuelsen, Martin Brekká og Samson Højgaard

**Sandavágur:** Olaf Berg, Rógvi Egilstoft Nielsen, Torkil Nielsen, Bernhard Augustinussen